# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg sá bilføraran hjá Dianu og Dodi drekka, men tað var bara stjórin, sum kundi siga nakað við hann*
*(barrvørður í París)*

# Hann skal loysa Putin av

**Vanliga verður tað, sum Vladimir Putin sigur, og tí er lítið at ivast í, at næsti russiski forsetin fer at eita Dmitrij Medvedev**



*Tann 42 ára gamli løgfrøðingurin Dmitrij Medvedev verður ivaleyst næsti forsetin í Russlandi*

- Eg havi havt nógv og gott samband við hann í meiri enn 17 ár, og eg havi av fullum huga undir við honum sum valevni til forsetavalið 2. mars.

- So greiður var Vladimir Putin, forseti, tá hann í gjár bleiv spurdur, hvat hann helt um, at Dmitrij Medvedev stillar upp til forsetavalið. Medvedev er valevni hjá flokkinum Sameint Russland og trimum øðrum flokkum, og við so stórum stuðuli og stuðuli frá forsetanum er lítil ivi um valúrslitið.

Dmitrij Medvedev, sum er 42 ára gamal, er útbúgvin løgfrøðingur, og hann verður mettur sum ein hóvligur politikari við góðum sambandi við russiska vinnulívið. Hann hevur starvast í umsitinginu hjá Putin síðani fyrst í nítiárunum, og í 2000 stóð hann á odda fyri valstríðnum hjá forsetanum. Hann hevur eisini verið starvsfólkaleiðari í Kreml og nevndarformaður í tí risastóra gassfelagnum Gazprom.

Roknað verður við, at alment verður Dmitrij Medvedev uppstillaður tann 17. desember.

# Carla del Ponte givin



*Carla del Ponte er í øðini inn á serbisku myndugleikarnar*
*Mynd: Polfoto*

**Høvuðsákærin við krígsbrotsmanna-dómstólin fyri gamla Jugoslavia hevur lagt frá sær**

Í gjár helt Carla del Ponte fráfaringarrøðu í ST, og tað hoyrdist á orðalagnum og á røddini, at hon er alt annað enn nøgd við umstøðurnar hjá dómstólinum, sum bleiv settur til at viðgera málini ímóti teimum, sum eru ákærdir fyri krígsbrotsverk í gamla Jugoslavia.

Hon duldi ikki fyri, at hon er bæði hørm og ill um, at myndugleikarnir í Serbia ikki hava útflýggjað teir báðar høvuðsmenninar aftan fyri fólkamorðið ímóti muslimunum í Bonsia, politiska leiðaran Radovan Karadzic og generalin Ratko Mladic.

Carla del Ponte er ikki í iva um, at serbisku myndugleikarnir hava í fleiri førum verið vitandi um, hvar teir báðir hava fjalt seg, men at myndugleikarnir hava ikki lagt í at taka teir, hóast bæði dómstólurin, ES og USA hava kravt tað.

# Danmark fær fleiri radarar

**Undir Kalda krígnum hevði Danmark sjey radarar fram við strondini. Í næstum verður talið 29**

Tað er ikki óttin fyri einum nýggjum køldum kríggi, sum hevur fingið myndugleikarnar at útbyggja radarkervið, men heldur ein roynd at forða skipum, sum hava óreglulig ørindi, at fjala seg nærhendis donsku strondini.

Tí hava myndugleikarnir gjørt av at seta eina røð av nýggjum radarum upp ymsastaðni kring landið. Millum annað fáa havnarbýir sum Hanstholm, Hirtshals og Skagen nýggjar radarar.

- Undir Kalda krígnum skuldu vit halda eyga við skipum hjá londum í Warszawa-samgonguni, sum sigldu í donskum sjógvi. Í dag er støðan ein onnur, so nú eru tað yvirgangur og vandin fyri dálking, sum vit skulu halda eyga við, sigur Per Højgaard-Jensen hjá Søværnets Operative Kommando við Jyllands-Postin.

Teir nýggju radararnir hava tilknýti til aðrar ávaringarskipanir so sum AIS-skipanina, sum øll skip, ið eru størri enn 300 bruttotons, skulu hava. Tað ger, at radarkervið kann fylgja skipum, sum koma í danskan sjógv.

## STUTT SAGT

### Kosova til ST

Serbiska stjórnin sýtir framvegis fyri at góðtaka, at Kosova fær sjálvstýri, soleiðis sum tann albanski meirilutin í landslutinum ætlar. ES kunngjørdi í gjár, at øll limalondini uttan Kýpros taka undir við, at Kosova verður sjálvstøðugt ríki, og tað fekk alt fyri eitt serbisku stjórnina at leggja málið fyri ST. Serbiski forsetin, Boris Tadic, segði í gjár, at málið verður lagt fyri trygdarráðið hjá ST við áheitan um at lata altjóða dómstólin í Haag gera úrskurð um, hvørt Kosova hevur lógarheimild til at taka sjálvstýri ella ikki. Albanski meirilutin í Kosova sigur, at Kosova verður lýst sjálvstøðugt tíðliga næsta ár.

### Oyggj sum tulipan

Í Niðurlondum hevur tjóðartingið sett eina nevnd at kanna møguleikarnar fyri at gera eina oyggj úti fyri norðsjóvarstrondini. Ætlanin er, at oyggin skal líkjast einari ovurstórari tulipan, og endamálið við oynni er at verja verandi strond og at útvega byggilendi. Niðurlendingar eru serfrøðingar innan strandarverju, og tað er eisini neyðugt í einum landi, har lendið er so lágt. Herfyri vísti ein meiningakanning, at fólk í Niðurlondum stúra meiri fyri einari flóðaldu uttan úr Norðsjónum enn yvirgangi. Hinvegin er eingin ivi um, at áhugin at búseta seg á oynni verður stórur, og politikararnir vænta at fáa einar 75 mia. krónur fyri byggilendið á oynni.

### Viagra drepur

Higartil í ár eru 47 norskir ferðamenn deyðir, meðan teir hava hildið frí í Teilandi. Norska sendistovan sigur, at í flestu førum er talan um menn í fimmtiárunum, sum eru deyðir eftir at hava tikið Viagra-tablettir. Í Teilandi kann ein keypa Viagra-tablettir í hondkeypi uttan at tosa við lækna fyrst. Sendistovan vísir á, at nógvur hiti, rúsdrekka og Viagra-tablettir er ein vandamikil blanding, ið kann fáa álvarssamar avleiðingar.